Barna- og útbúgvingarmálaráðið

Dagfesting:	22. sep. 2025
Mál nr.:	25/25483
Málsviðgjørt:	EØ
Ummælistíð:	N/A
Eftirkannað:	22. sept. 2025

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um lestrarstuðul
(Hækkaður lestrarstuðul - fylgilógaruppskot til FLU 2026)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 36 frá 3. mai 2007 um lestrarstuðul, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 135 frá 8. desember 2023, verður í § 7, stk. 2 “kr. 4.315” broytt til: “kr. 6.139”.

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. august 2026.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið
Upphæddin til lestrarstuðul varð seinast broytt í lógini við ll. nr. 102 frá 3. november 2016, tá upphæddin fór frá at vera 3.815 kr. til at vera 4.315 kr.

Síðani tá hevur upphæddin ikki verið regulerað aftur í lógini, men einans javnað í kunngerð, seinast við kunngerð nr. 123 frá 10. desember 2024 um javning av lestrarstuðli, har upphæddin varð sett til 5.139 kr.

Samgongan hevur sett sær fyri at bøta um korini hjá teimum lesandi í Føroyum, soleiðis at fleiri velja at taka útbúgving her heima. Tískil er ætlanin at bøta um umstøðurnar hjá teimum lesandi á hægri lesnaði í Føroyum, við eitt nú at hækka lestrarstuðulin.

1.2. Galdandi lóggáva
Lógin varð kunngjørd í 2007, m.a. við tí endamáli at fáa eina fullfíggjaða og greiða lóg, sum fevnir um alt lestrarstuðulsøkið.

Upphæddin fyri tey, sum taka hægri lesnað, varð endurskoðað og broytt í lógini í 2016, og hevur síðani einans verið javnað í kunngerð.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við lógini er at geva teimum lesandi betri fíggjarlig kor, tá tey velja at fara undir hægri lesnað í Føroyum.

Í løtuni er talið av teimum, sum taka hægri lesnað her heima uml. 1000, men er tað ynski hjá samgonguni at fáa enn fleiri at verða verandi her í Føroyum og nema sær útbúgving, tá tað er ein sannroynd, at fleiri av teimum, sum fara uttanlands at lesa, ikki koma heimaftur.

Orsakir til, at nøkur velja at fara uttanlands at lesa, kunnu vera ymiskar, men tykist ein orsøk at vera, at trupult kann vera at fáa endarnar at røkka saman, tá ein fer undir hægri lesnað í Føroyum.

Fyriliggjandi uppskot skal bøta upp á hetta við at hækka lestrarstuðulin, soleiðis at korini hjá teimum lesandi gerast betri.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Upphæddin hjá teimum, ið taka hægri útbúgving í Føroyum, verður í lóggávuni hækkað við 1.000 kr. í mun til tað, sum er ásett í kunngerð nr. 123 frá 10. desember 2024, um javning av lestrarstuðli í 2025, har upphæddin er 5.139 kr.

Upphæddin verður framhaldandi javnað sambært § 19.

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskotið hevur ikki verið í hoyring, men verður borið í Løgtingið saman við fíggjarlógaruppskotinum.

Kapittul 2. Avleiðingar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Tað, at lestrarstuðulin verður hækkaður við 1.000 kr. um mánaðin, fer at hava fíggjarligar avleiðingar fyri landskassan.

Tað eru á leið 1.000 lesandi, sum taka hægri útbúgving í Føroyum.

Út frá hesum, og vísandi til, at gildiskoma er 1. august 2026, verður hækkanin í 2026 mett at verða á leið 4,5 mió. kr., og eftirfylgjandi á leið 6,3 mió. kr. í 2027. Ialt verður tørvurin sostatt 10,8 mió. kr. meiri í mun til áðrenn broytingina.

Endamálið við uppskotinum er tó at fáa talið av teimum lesandi í Føroyum upp, og fer útreiðslan til lestrarstuðul tískil eisini at hækka, í takt við, at fleiri velja at taka útbúgving í Føroyum. Hetta er tó ikki innroknað í fíggjarligu metingarnar, tí væntast kann, at tað fer at taka nakað av tíð, áðrenn virknaðurin fer at merkjast.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur jaligar sosialar avleiðingar fyri tey, sum taka hægri lesnað í Føroyum.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri millumtjóasáttmálar.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Lógaruppskotið sampakkar við hesar tvørgangandi sáttmálarnar, og hevur ikki árin á hesar.

1) **Hoyvíkssáttmálin**
   Sáttmálin varð settur í gildi í Føroyum við *Løgtingslóg nr. 66 frá 18. mai 2006 um at seta í gildi Hoyvíkssáttmálan Sáttmáli millum stjórn Íslands, øðrumegin, og stjórn Danmarkar og Føroya landsstýri, hinumegin*. Sáttmálin hevur virkað frá 31. august 2005.

   Løgtingið viðgjørdi sáttmálan í løgtingsmáli nr. 15/2005, og tann 2. mai 2006 samtykti Løgtingið løgtingslógina endaliga.

Sáttmálin skipar Føroyar og Ísland sum eitt búskaparøki, har tað innan fyri innihaldsvídd sáttmálans er bannað at gera mismun vegna tjóðskap, virkisstað ella vegna vøruuppruna.

2) Evropeiski mannarættindasáttmálan, EMRS
Sáttmálin varð settur í gildi fyri Føroyar sum lóg tann 1. mai 2000 við *Anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om den europæiske menneskerettighedskonvention*.

Løgtingið viðgjørdi sáttmálan í løgtingsmáli nr. 12/1994: Uppskot til samtyktar um Ígildissetan fyri Føroyar av lóg um Tann Evropæiska Mannarættindasáttmálan. Uppskotið varð samtykt við 29–0 atkvøðum. Við løgtingsmáli nr. 92/1995: Uppskot til ríkislógartilmæli um Broyting í lóg um tann europeiskan mannarættindasáttmálan varð samtykt, at protokollirnar 9–11 eisini skuldu setast í gildi fyri Føroyar. Evropeiski Mannarættindasáttmálin sum samtyktur við løgtingsmál nr. 12/1994 og broytingarnar sum samtyktar við løgtingsmáli nr. 92/1995 komu tó ikki í gildi fyri Føroyar fyrr enn tann 1. mai 2000.

Evropeiski Mannarættindasáttmálin hevur til endamáls at verja borgarar í teimum evropeisku londunum ímóti mannarættindabrotum. Sáttmálin varð samtyktur í Evroparáðnum í 1950 við íblástri frá heimsyvirlýsingini hjá ST.

Ein røð av ískoytisprotokollum er løgd aftur at sáttmálanum gjøgnum árini. Í Føroyum er í gildi høvuðssáttmálin frá 4. november 1950 sum broyttur við protokoll nr. 3, 5, 8, 10 og 11 og ískoytisprotokollirnar nr. 1, 4, 6 og 7.

3) Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek
Sáttmálin er ikki settur í gildi í Føroyum sum lóg, men sum altjóða sáttmáli.

Løgtingið viðgjørdi sáttmálan í løgtingsmáli nr. 162/2008 og nr. 163/2008, og tann 13. mai 2009 góðkendi Løgtingið sáttmálan.

Sáttmálin fekk gildi fyri Danmark og harvið eisini fyri Føroyar tann 23. august 2009.

Sáttmálin áleggur limalondunum at menna og fremja politikk, lógir og fyrisitingarlig mál, ið skulu tryggja rættindi hjá fólki, ið bera brek.

Sáttmálin er kunngjørdur við *Bekendtgørelse nr. 20 af 15. november 2017 af FN-konvention af 13. december 2006 om rettigheder for personer med handicap*.

Danska Institut for menneskerettigheder hevur gjørt eina leiðbeining um sáttmálan: www.menneskeret.dk
(Sí nr. 1.2.2.8. í rundskrivinum um lógarsmíð).

2.9. Markaforðingar
Lógaruppskotið hevur ikki nakrar markaforðingar við sær.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir, og ger ikki inntriv í rættindi hjá fólki

2.11. Skattir og avgjøld

Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um skattir ella avgjald.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið leggur ikki skyldur á likamligar ella løgfrøðiligar persónar.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið viðførir ikki heimildir til landsstýrisfólk, stovn undir landsstýrinum ella kommunum.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Ja	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Ásetingin hevur við sær, at upphæddin, sum í lóg er ásett til áljóðandi kr. 4.315, verður hækkað til kr. 6.139.

Til § 2
Gildiskoma er 1. august 2026.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið, 26. september 2025

Djóni Nolsøe Joensen
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen